# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Bárður er norðurlendskur meistari



*Fagnaðurin var stórur, tá tað stóð greitt, at Marienlyst hevur vunnið heitið sum norðurlendskur meistari*

**Saman við Marienlyst vann Bárður B. Mikkelsen allar dystirnar, tá NM-kappingin í flogbólti varð spæld um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað regnar við heiðursmerkjum yvir Bárð Bendix Mikkelsen og liðfelagar hansara í Marienlyst Volley.

Eftir at tað næst seinasta vikuskifti eydnaðist teimum at vinna donsku steypafinaluna í flogbólti, var Marienlyst hetta vikuskiftið í Falkenberg í Svøríki, har NM-kappingin fyri feløg var á skránni.

Og her gjørdu nýkosnu steypavinnararnir bart. Kappast varð móti norska Nyborg, Midelfart úr Danmark og Falkenberg úr Svøríki, og eydnaðist tað Marienlyst at vinna allar dystirnar og harvið kappingina.

Sjálvur hevur Bárður ikki havt støðu sum fastur maður á liðnum hjá Marienlyst, men royndir hansara koma tó liðnum væl við. Og enn hevur føroyski hevarin so als ikki fingið nóg mikið.

- Nú mangla vit bara at vinna DM. Gera vit tað, so eru vit fyrsta danska liðið, sum vinnur steypakappingina, NM og DM í einum og sama kappingarári. Samstundis er DM-heitið tað einasta, sum eg ikki havi vunnið í donskum flogbólti, so tað vil eg fegin royna, sigur Bárður Bendix Mikkelsen.

# Tríggir berjast um GP-heiðurin

**Tað styttist millum teir tríggjar Róa Agnarsson, Petur Niclasen og Ragnar Egilsson í føroysku Grand Prix-kappingini. Um vikuskiftið varð fjórða og triðseinasta umfar leikt í høllini í Trongisvági.**

BORÐTENNIS
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Føroyski borðtenniskongurin, Petur Niclasen, sum hevur vunnið FM ikki færri enn 14 ferðir, er ein av trimum leikarum, sum kappast um at vinna samlaðu Grand Prix-kappingina fyri vaksin. Petur er í løtuni smáskaddur og luttók tí ikki í kappingini, sum um vikuskiftið varð avgreidd í høllini í Trongisvági.

## Ragnar gjørdi bart

Fráveran hjá Peturi gav rúm til Róa Agnarsson og Ragnar Egilsson, sum eru partar av grót hørðu kappingini millum teir tríggjar. Ragnar, sum er verandi FM-vinnari, lat ongan iva vera um at hann helst er sterkasti borðtennisleikari í Føroyum í løtuni, og vann hann allar sínar dystir. Hetta styrkir honum munandi um støðuna í samlaðu kappingini, og eftir tvær ikki heilt nøktandi GP-kappingar fyri hansara viðkomandi, er hann nú bara 50 stig frá Róa Agnarssyni, sum sanniliga eisini er væl koyrandi og liggur á odda í samlaðu GP-kappingini.

## Fyrireika til OyL

Borðtennis er trúðfastur partur av Oyggjaleikunum, og í tí sambandi hevur danski landsliðsvenjarin hjá føroyska landsliðnum, Casper Løje Pedersen, úttikið ein fyribils landsliðshóp, sum skal venja fram ímóti Oyggjaleikunum í Álandi í summar. Tey, sum eru við í hópinum, eru Rói Agnarsson, Ragnar Egilsson, Hallur Thorsteinsson, Marin í Dali, Sheila Strøm og Rakul Mikkjalsdóttir. Seinast nevnda gongur í løtuni á borðtenniseftirskúla í Danmark og hevur staðið seg sera væl til kappingar í annars sterku borðtennistjóðini.

Fyrireikingarnar innihalda fyribils fleiri venjingar um vikuna, og ætlanin er eisini, at hópurin skal til Grønlands á venjingarlegu seinni í vár.

**Bólkavinnararnir:**

**Bólkur A:** Ragnar Egilsson, Tór
**Bólkur B:** Karl Arni Egholm, KÍ
**Bólkur C:** Tórur Dahl, Tór
**Bólkur D:** Jónar Holm, Royn
**Bólkur E:** Eyðfinnur Jensen, Royn
**Bólkur F:** Eyðbritt Holm, Royn
**Bólkur G:** Herman Winther, Tór

# Coca-Cola kapping fyri øll

**Eisini yngru deildirnar spæla steypafinalur í hondbólti um vikuskiftið. Sunnudagin leggur serliga undirlagið gólv til heili átta finalur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum nakað nýtt verður stóri steypadagurin í hondbólti nú eisini víðkaður til at fevna um yngru deildirnar.

Eftir at tey vaksnu sunnudagin avgreiða sínar finalur, eru tað børnini, sum eiga tørn sunnudagin, og allan seinnapartin verða avgerandi dystirnir spældir í ymsu aldursbólkunum, skrivar HSF í tíindaskrivi.

Og nógv verður lagt fyri, soleiðis at karmarnir kring dystirnar hjá liðunum skulu vera á so høgum støði, sum gjørligt.

Serliga gólvið, sum verður lagt á til finalurnar leygardagin, liggur eisini á sunnudagin, og tað verða dómarapørini, ið vanliga døma fremstu mans- og kvinnudeildirnar, sum døma dystirnar.

Medaljuhandan verður beint eftir dystirnar.

## FAKTA um dystin

| Klokkan | Aldursbólkur | dystarlongd |
|---|---|---|
| 12:50 | Gentur 10 | (2x10 min) |
| 13:25 | Dreingir 10 | (2x10 min) |
| 14:00 | Gentur 12 | (2x15 min) |
| 14:45 | Dreingir 12 | (2x15 min) |
| 15:30 | Gentur 14 | (2x20 min) |
| 16:30 | Dreingir 14 | (2x20 min) |
| 17:30 | Gentur 17 | (2x25 min) |
| 18:45 | Dreingir 17 | (2x25 min) |

**Dómararnir**

Karstin Joensen og Kristian Joensen
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen
Kári Hansen og Sámal Hansen
Tummas Juul Thomsen og Birgir Sondum
Rúni Mohr og Ragnar Simonsen
Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen